## 5400 áskoðarar og 73 likkur

Ikki færri enn 5400 áskoðarar sótu kring Tórsvøll í gjár. Hetta er met, tá talan er um dyst hjá einum føroyskum fótbóltsfelag. Atgongumerki vórðu seld kring alt landið, umframt at dysturin var vístur í beinleiðis sjónvarpið – Sjónvarpið Føroya og Sentata Sports. Áskoðararnir vóru vitni til ein fínan fótbóltsdyst, har EB/Streymur stríddist manniliga, men Manchester City var klassar omanfyri og vann 0-2. Eisini sóu áskoðararnir eitt hav av likkum, sum kappaðust um pilsustubbarnar, ið áskoðararnir tveittu frá sær. Vit lata myndina, sum Annika Waag Dam tók undir dystinum, tala fyri seg.



## Kvinnulandsliðið til 4-landakapping

Føroyska kvinnulandsliðið hevur fingið innbjóðing frá Bretska Hondbóltsambandinum til eina 4-landakapping í Sheffield. Við í kappingini eru Stóra Bretland, Latvia, Turkaland U21 og Føroyar. Kappingin verður 16. til 19. oktober í ár í stóra ítróttardeplinum í Sheffield. Landsliðsvenjingarnar byrja í august mánað, tá landsliðsvenjarin Sophus Dal-Christiansen og hjálparvenjarin Jacob Jónsson fara at taka út ein bruttohóp.

# Størsta nakrantíð

**Í bóltyvirtøku stóðu vit eisini mát við teir í seinna umfarinum, sigur Leif Niclasen, sum metti dystin verða størstu upplivingina higartil**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*



*Leif Niclasen metir, at teir í EB/Streymi kunnu vera vælnøgdir*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Leif Niclasen hevði úr at gera at verja fyri Stephen Ireland, sum var miðvallari í høgru hjá Manchester City á Tórsvølli gjár. Hann staðfesti eftir dystarlok at talan var um heilt serliga uppliving – tann størsta higartil.

- Hetta var sera stuttligt. Eg havi ikki verið við til nakað líknandi áður, og møguliga sleppi eg heldur ikki tað aftur. So hetta var frálíkt.

Ja, og 2-0 tap á heimavølli móti Manchester City?

- Eg haldi, at vit kunnu vera væl nøgdir. Seinni hálvleikur endaði eisini málleysur, so tað er fínasta slag.

EB/Streymur legði bragdliga fyri eftir hvíldina í gjárskvøldið. Einu lítlu løtuna eydnaðist tað sundalagsmonnum at trýsta gestirnir. Sjálvur var Leif Niclasen eitt sindur bilsin av hesum.

- Orsøkin var helst, at teir tóku sær av løttum. Í bóltyvirtøku stóðu vit eisini mát við teir í seinna umfarinum. Tað riggaði væl hjá okkum. Innskiftingarnir stóðu seg væl, og tað nervaði okkum als ikki, sigur Leif Niclasen.

# Rós til EB/Streym

**EB/Streymur eigur rós uppiborið fyri seinna hálvleik, har vit meira tóku okkum av løttum. Úrslitið var fínasta slag, og nú verður í øllum førum trupult hjá teimum at sleppa víðari**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

- Vit kundu verið fyri sannari eyðmýking, um vit ikki tóku dystin í álvara. Tað var neyðugt, at vit høvdu rætta hugburðin, og sum heild eri eg nøgdur við avrikið.

Mark Hughes, venjari hjá Manchester City, lat væl at dystinum á Tórsvølli i gjár. Hann metti, at EB/Streymur var omaná í seinna hálvleiki, men vandamiklir vóru føroyingarnir ongantíð.

- Vit góvu teimum nógv at hugsa um undan steðginum. Vit fluttu bóltin væl og høvdu fleiri innlegg. Men EB/Streymur eigur rós uppiborið fyri seinna hálvleik, har vit meira tóku okkum av løttum. Úrslitið var fínasta slag, og nú verður í øllum førum trupult hjá teimum at sleppa víðari, sigur Mark Hughes, sum hevði rósandi orð at bera dómaranum.

Tú hevur verið í Føroyum fyrr sum walisiskur landsliðsleikari, hvussu er at vera aftur?

- Tað er fínasta slag, serliga nú, tá eg havi vunnið her fyri aðruferð. Eg kenni fleiri av støðunum aftur, millum annað leikvøllin her, sigur Mark Hughes.

Sosialurin kann upplýsa, at Tórsvøllur var í øllum førum ikki bygdur í 1993, so spurningurin er, hvønn vøll Manchester City venjarin vísir til.



*Hetta var fínasta slag, og nú verður í øllum førum trupult hjá teimum at sleppa víðari, sigur Mark Hughes, venjari hjá Manchester City*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

EB/Streymur – Manchester City 0-2 (0-2)

# Avbjóðingin var

**Veruleikin var staðfestur á Tórsvølli í gjár. Manchester City var klassar omanfyri EB/Streym og vunnu eisini trygt. Samstundis vístu leikararnir hjá EB/Streymi eisini, at fleiri teirra eru ógvuliga stinnir og djarvir**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Manchester City gjørdi sína skyldu. Tað gjørdi EB/Streymur eisini. Heimamenninir forðaðu einum skrædli, ið fleiri høvdu stúrt fyri. Teir vístu góðan hugburð og góvust ongantíð. Allan dystin á tamb stríddust teir fyri hvørjum bólti, og tað hevði við sær, at tapið, sum var ómøguligt at sleppa undan, ikki gjørdist meiri enn tvey mál.

Men hóast EB/Streymur gjørdi sítt, og onkur kanska meiri enn tað, so var tað sjónligt, at Manchester City var fleiri klassar omanfyri oddaliðið í Formuladeildini.

### Óvæntað uppstilling

Sigfríður Clementsen valdi at binda um heilan fingur til dystin. Verjan var tann, fólk flest høvdu roknað við. Men at bæði Fróði Clementsen og Anders Post Jacobsen byrjaðu á sentrala miðvøllinum saman við Levi Hanssen, sum kom væl frá uppgávuni, var heldur óvæntað. Hugskotið við hesum hevur helst verið, at fáa tveir fysiskt sterkar menn, sum kunnu fylla eitt sindur upp undir liðini á Levi Hanssen. Tað riggaði eisini hampiliga væl.

Úti í borðunum spældu Hans Pauli Samuelsen og Arnbjørn Hansen. Síðst nevndi kom ikki veruliga til sín rætt, fyrr enn hann var fluttur upp í álopið, meðan Hans Pauli Samuelsen ikki fekk nakað serligt burtur úr. Onkrar flottar driblingar og temjingar hevði víkarmaðurin, men hugburður hansara tóktist at vera heldur uppgevandi til tíðir, og tískil valdi Sigfríður Clementsen at seta Hanus Eliasen inn í staðin.

Fremsta sessin átti Peter Foldgast. Higartil hevur tað verið so sum so við hansara avrikum, men í gjárkvøldið spældi hann ein góðan dyst, har tað veruliga kom til sjóndar, at hann er vanur við at spæla fótbólt á hampiliga høgum støði. Hann dugdi væl at taka bóltin niður, halda eitt sindur upp á hann og vinna EB/Streymi tíð. Hann taldist millum bestu leikararnar hjá EB/Streymi í gjár.

Bestur fyri felagsliðið var tó Marni Djurhuus. Hann vísti veruligt stórspæl. Stýrdi verjuni og liðnum sum heild, rópti tá tað var neyðugt, spardi seg ikki í nærdystunum og tordi at taka neyðugu kjansirnar.

Undir hansara lið var liðformaðurin Egil á Bø, sum eisini av røttum kann vera errin um sítt avrik.

Bakkarnir báðir, Leif Niclasen og Bárður Olsen høvdu tað trupult. Teir kunnu tó væl standa inn fyri sítt avrik, hóast Leif Niclasen onkuntíð tóktist íðan lættur at yvirspæla.

Í málinum byrjaði René Tórgarð dystin við ein frágera góðari bjarging, og málini bæði fekk hann ikki gjørt nakað sum helst við.

### Málini

Manchester City legði fyri júst sum væntað – eitt øgiligt trýst frá byrjan. Omanfyrinevnda bjarging var neyðug beinanvegin í dystinum, sum kortini ikki gjørdist nógvar minuttir gamal, áðrenn hol kom á.

Darius Vassel spældi tvørtur um feltið til Martin Petrov, ið høgdi bóltin í netið.

Nakrar minuttir seinni slapp Vassel sjálvur at royna seg, men einsamallur við René Tórgarð, eydnaðist tað havnarmanninum at verja fyri.



So hasaði ógvusliga trýstið av eina løtu, og um miðan fyrra hálvleik tordi EB/Streymur at ota seg nakrar metrar fram á vøllin. Teir komu tó ikki langt, tí eftir hornaspark hevði týski Dietmar Hamann økt um leiðsluna. Bólturin sprakk út til hansara, og skamt uttanfyri brotsteigin fluktaði Hamann bóltin flott upp í hornið.

Manchester City hevði fleiri aðrar møguleikar, ið kundu givið mál aftrat, men so var ikki. EB/Streymur megnaði tó heldur ikki at fáa netmeskarnar at blaktra, og høvdu ikki nevniverdan møguleika undan steðginum.